## Vandamikil dani flýddur

Um middagsleitið í gjár flýddi 31 ára gamli Kalle Holmgaard Knudsen úr fongslinum í Viborg, har hann sat fongslaður. Farligi fangin var dømdur 7 ára handan rimar fyri at hava bukað ein mann til deyðis, og verður tí lýstur sum lívsfarligur. Tað eydnaðist honum at renna út í garðin, tá ið døgurðatíð var. Herfrá klintraði hann upp um ein 3 metrar høgan garð. Løgreglan í Viborg væntar at maðurin framvegis er at finna í býnum, av tí at rýmingin ikki var ætlað.




## Virða ikki ferðslulógina

Á bryggjubakka í Havn er ikki líkt til, at parkeringsbannið verður yvirhildið. Nú nógv ferðafólk eru í landinum og ávegis til landið, er sett bann á at parkera í hugnaliga umhvørvinum niðri við sjóvarmálan. Bilførarar tykjast tó ikki at hava virðing fyri hesum, og alt ov nógvir bilar perkera á økinum kortini. Á heimasíðuni hjá Tórshavnar Kommunu eru tey eisini kedd um, at tey nógvu ferðafólkini ikki sleppa at síggja vakra útsýnið yvir flotta bátahylin, men bert síggja í reyvina á parkeraðum bilum.



*Fíggjarnevndin játtaði fyrrapartin tvær milliónir eyka til rakstur og umbygging í Hoydølum*

*Savnsmynd*

# Varðveita tónleik í Hoydølum

**Í hesum døgum arbeiðir leiðslan á Føroya studentaskúla við at gera eina kostnaðarmeting, ið skal vísa, hvar til ber at hava tónleikaundirvísing í framtíðini. Hóast gamla gentukostdeildin herfyri brann, fer tó helst at eydnast at varðveita tónleikaumhvørvið í Hoydølum**

SKÚLI
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Eftir at gamla gentukostdeildin ella tað sokallaða Nýggja hús í Hoydølum brann, hevur leiðslan á Føroya studentaskúla fingist við at finna nýggj høli til evning og tónleik.

Mikkjal Helmsdal, rektari, sigur, at arbeitt verður við eini ætlan at umbyggja eini goymsluhús, sum standa millum sjálvan skúlan og sonevnda Gamla hús til tónleikahøli.

Annars verður eisini umhugsað at húsast á annan hátt á skúlans øki, og harafturat verður helst samkomuhøllin helst eisini brúkt til tónleikaundirvísing.

Mikkal Helmsdal sigur, at tey helst vilja hava lærugreinina tónleik á skúlans øki í Hoydølum, og ikki í leigaðum hølum aðrastaðni í býnum, av tí at tónleikur verður mettur at vera ein so týdningarmikil partur av umhvørvinum í Hoydølum. Rektarin sigur seg vóna, at gamla gentukostdeildin verður bygd uppaftur. Til hetta møguliga verður gjørt, er avgjørt, at lærugreinin evning verður í gamla læknahúsinum niðan fyri Hvítanesvegin.

Rektarin minnir á, at hvør loysn enn so verður vald á hølistrupulleikunum á skúlanum, so skulu tey í øllum førum húsast í Hoydølum eini 4-5 ár afturat, og tí vónar hann, at gentukostdeildin verður bygd uppaftur.

### Eykajáttan

Leiðslan á skúlanum hevur søkt fíggjarnevnd Løgtingsins um eykajáttan, og hesum væntar rektarin, at tey fólkavaldu í tinginum fara at eftirlíka.

Í húsunum, sum brunnu, stóð m.a. eitt flygil og nýggj trummusett, og tilsamans fóru ljóðførí fyri yvir eina millión fyri skeytið. Harafturat fórst eitt týdningarmikið plátusavn, og nú má arbeiðast við at gera eitt nýtt savn, so tey týdningarmiklastu tíðarskeiðini í tónleikasøguni aftur kunnu ljóða í studentaskúlanum – hvørt hetta so verður á vinyl ella undir geisla.

Í dag fáa tær nýfloygdu pisurnar annars prógv, og Mikkjal Helmsdal sat og setti tað seinasta av hátíðarrøðuni saman, tá Sosialurin ringdi til hansara. Hann avdúkaði tó, at røðan fór at snúgva seg um framtíðina og møguleikarnar hjá pisunum, heldur enn um eldin í Hoydølum.

Herfyri varð staðfest, at eldurin í Hoydølum kom av einum óhappi, tá arbeiðið varð gjørt uttan fyri kostdeildina. Per Skov Christensen, kriminalpolitistur, sigur, at í fyrstu syftu varð hildið, at ravmagn var orsøkin, men síðani varð staðfest, at eingir leidningar vóru, har eldurin kyknaði.